# Tannapínan má bíða

**Allar tannlæknastovurnar í høvuðsstaðnum hava stongt millum jóla og nýggjár**

TANNAPÍNA
*Eyðun Klakstein*

Tannapínan í høvuðsstaðnum hevur tað ikki gott á jólum.

Allar tannlæknastovurnar í Havn hava stongt millum jóla og nýggjár, og bara ein tíma um dagin er gjørligt at fáa fatur á eini tannlæknavakt, sum kann taka sær av tí mest átrokandi.

Hetta er komið illa við hjá fólki, sum hava fingið tannapínu í kjalarvørrinum frá flóðini av karamellunum og sjokulátuni, sum floymir yvir børn og vaksin jóladagarnar.

Foreldur, sum hava vent sær til Sosialin, eru næstan komin í rasshaft av tannlæknafrítíðini, tí børn eru komin so illa fyri av tannapínu.

Men telefonsvararnir á teimum seks tannlæknastovunum í Havn greiða fólki við átrokandi ørindum frá, at stongt er millum jóla og nýggjárs, og at opið er aftur týsdagin.

– Tá ert tú vælkomin at ringja aftur, sigur ein av telefonsvararunum.

So er bara at vóna, at ræðuliga tannpínan ikki er horvin tá.


## Starv
innan ráðlegging og sølu

Til søludeildina hjá P/F Vestsalmon í Kollafirði verður søkt eftir fólki til ráðlegging og sølu av alifiski.

Vit seta ikki serlig krøv til útbúgving sum so, men vit rokna við, at tú ert ágrýtin og áhugað/ur í at náa góð úrslit. Umsøkjarar við eksporttekniskari ella líknandi útbúgving hava fyrimun, men tað er ikki ein treyt.

Av fremmandamálum er neyðugt at duga enskt og norðurlendskt.

Av tí at tú fert at arbeiða í tøttum samstarvi við stjóra, søluleiðara, virkisleiðara, góðskufólk, brunnbát, alarar og annars allar partar av Vestlax samtakinum, er av týdningi at tú ert fyrikomandi og leggur dent á samarbeiði.

Arbeiðið umfatar m.a.:
- Tilrættislegging av tøku av alifiski
- Samskifti við alarar og kundar
- Samskifti við brunnbátar
- Samskifti við flutningsfeløg

í tøttum samstarvi við søluleiðaran.

Vestsalmon framleiðir eftir góðskuskipanini ISO 9000/ HACCP og selur alifisk til marknaðirnar í Evropa, USA og Asia.

So hvørt sum tú búnast í yrkinum, verða avbjóðingarnar størri. Talan er um eitt mennandi starv í einum støðugt vaksandi umhvørvi, í samstarvi við altjóða fyritøkur.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til Hjalta Dalheim, tel 42 16 91.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. jan. 2001. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

VESTSALMON

**P/F Vestsalmon · Postboks 82 · 410 Kollafjørður · Att: Hjalti Dalheim**

*P/F Vestsalmon er partur av Vestlax samtakinum. Virkið hagreiðir umleið 10.000 tons av alifiski árliga og her arbeiða umleið 50 fólk. Vestlax samtakið samstarvar við Pan Fish ASA. Í Føroyum eru umleið 170 fólk í arbeiði.*


# Creamy byrjar konsertferð í Føroyum

**10. februar fer hálvføroyski poppbólkurin úr Danmark at hava konsert í ítróttarhøllini í Runavík**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Vælumtókti danski poppbólkurin Creamy, sum er mannaður við føroysku Rannvu og donsku Rebekku, kemur til Føroyar at hava konsert í februar mánaði.

Konsertin við Creamy verður í ítróttarhøllini í Runavík 10. februar, og um tað skuldi veirð útselt til hesa konsertina, verður møguliga ein eykakonsert í Runavík dagin eftir.

Creamy høvdu tvær konsertir í Føroyum í fjør, og tær konsertirnar eydnaðust serstakliga væl. Nógv børn vóru til tiltøkini, og undirhaldið var gott.

### Nýggja fløgu

Stutt fyri jól gav Creamy sína næstu fløgu út, og á hesi fløgu syngja tær á enskum. Hendan fløgan hevur selt væl í Danmark.

Nu skal bólkurin undir nýggja konsertferð, og í løtuni venja tey til hesar konsertirnar. Fyrsta konsertin í røðini verður tann í Runavík í februar mánaði, og tí fáa føroyingar eitt nýtt show saman við tónleikinum.

Creamy fara at spæla sangir av bæði nýggju og gomlu fløguni, og nú tær eisini hava sungið á føroyskum, verður okkurt helst eisini at hoyra á móðurmálinum hjá Rannvu.

Atgongumerki til konsertina – sum kosta 135 krónur – fáast í Statoilstøðunum kring landið og í Kunningarstovuni í Havn. Skipað verður fyri góðum samband til konsertinar bæði sunnanífrá og norðanífrá.

Stríðið um listabókina:

# Emil Thomsen hevur nú stevnt forløgunum

**Føroyska og danska forlagið, sum hava givið listabókina hjá Bárður Jákupsson út, verða kravd eftir tilsamans 200.000 krónum í endurgjaldi fyri at hava brúkt listaverk ólógliga**

RÆTTINDASTRÍÐ
*Eyðun Klakstein*

Emil Thomsen hevur latið Føroya Rætti eina stevning ímóti forløgunum, sum hava givið bókina Myndlist í Føroyum út.

Bókin er givin út bæði á føroyskum og donskum, og útgávufeløgini – Sprotin í Føroyum og Atlantia í Danmark – verða kravd eftir 100.000 krónum í endurgjaldi hvør.

Emil Thomsen krevur eisini, at forløgini verða dømd at viðurkenna fútaforboðið ímóti at bókin verður seld, og harafturat krevur hann, at rætturin ásetur revsing fyri lógarbrotið.

### 600 eintøk seld

Hósdagin fyri jól varð fútaforboð sett fyri, at nýggja listabókin hjá Barður Jákupsson varð seld í Føroyum.

Orsøkin til forboðið var, at í bókini vóru 9 listaverk hjá nólsoyinginum Steffan Danielsen endurgivin, uttan at Emil Thomsen, sum eigur rættindini til øll verkini hjá listamanninum, varð spurdur um neyðugu loyvini til at brúka myndirnar.

Emil Thomsen kravdi tí, at forboð varð sett fyri, at bókin kundi seljast, og hesum tók rætturin undir við.

Nýggja listabókin – sum er ein føroysk myndlistasøga – varð tí tikin av hillunum, júst sum jólasølan kom í hæddina seinastu dagarnar fyri jól, og hetta var ein smeitur fyri søluna. Føroyska útgávan av bókini seldi tó 600 eintøk, áðrenn hon varð bannað.

### Dyggur smeitur fyri Sprotan

Skal fútaforboð kunna standa við, er neyðugt við eini stevning innan eina viku, eftir at tað er ásett, og hesa freistina helt Emil Thomsen.

Føroya Rættur hevur fingið stevningina, og nú verður bíðað eftir, at rætturin skal taka málið upp til dóms. Tað verður helst nakrar vikur inn í nýggja ári.

Føroyski útgevarin, Sprotin, kann enda við at fáa eitt stórt endurgjaldskrav, samstundis sum forlagið hevur mist part av søluni, og tað er dyggur smeitur fyri forlagið.

– 100.000 krónur ljóða kanska ikki av nógvum í tí stóra samanhanginum, men hjá einum lítlum forlagið sum okkara eru tað nógvir pengar, sigur Jonhard Mikkelsen, sum rekur forlagið Sprotan.

### Endurgjaldskrav í tveimum

Endurgjaldskravið ímóti Sprotanum og danska forlagnum er býtt í tvey.

50.000 krónur verða kravdar sum endurgjald fyri sjálva misgerðina, at listaverkini vórðu brúkt uttan loyvi frá rættindahavaranum. Seinna helvtin er vanligt endurgjaldskrav, sum kann krevjast, um rættindahavarin kann ávísa ítøkiligt fíggjarligt tap. Emil Thomsen hevur havt ætlan um at gera eina bók um Steffan Danielsen og hansara verk, og nú 9 listaverk hjá Steffani eru í listabókini, heldur hann, at hann hevur verið fyri fíggjarligum tapi.

Og sum seinasta slagið við stertinum kann sigast, at ætlanin var, at Bárður Jákupsson skuldi gera bókina um Steffan Danielsen.



# Nýggjársheilsanir frá floksleiðarunum

**Vit hava heitt á leiðararnar fyri politisku flokkarnar á tingi um at skriva eina stutta politiska heilsan til Føroya fólk fyri komandi ár. Vit prenta heilsanirnar her. Tíverri bar ikki Fólkaflokkinum til at vera við í ár.**



Javnaðarflokkurin
*Jóannes Eidesgaard*

### Menniskjað aftur í miðdepilin

Eitt ljóst høvd hevur einaferð sagt, at ein dugnaligur politikari er ein, sum dugur at siga, hvat fer at henda í framtíðini, og sum síðani skilagott kann greiða frá, hví tað ikki hendi, sum hann hevði spátt.

Hetta er tíðin, tá ið vit steðga á og gera støðuna upp. Ársfrágreiðingar og ársroknskapir um farna árið hoyra tíðini til, men samstundis er hetta tíðin, har metingar verða gjørdar um nýggja árið, sum vit standa á gáttini til.

Fyrsta árið í nýggju øldini hevur verið merkt av, at tað gekk okkum til vildar á flest øllum økjum. Hóast vit ongan tjóðarroknskap hava, so hava vit havt stóran búskaparligan vøkstur. Eins kørg, sum náttúran var við okkum í byrjanini av 90-unum, eins rík hevur náttúran verið móti okkum seinastu árini. Hetta saman við góðum fiskaprísum og øktum útflutningi hevur aftur skapt optimismu og lívsmót í føroyska fólkinum. Og júst hesar umstøður áttu at verið besti gróðrarbotnur fyri veruligum frambrotum í føroyska samfelagnum.

Men árið í ár eins og undanfarnu tvey árini hevur stórt sæð bert verið merkt av tí eina málinum um fullveldi í hesum valskeiðnum. Men nú knappliga trý ár eru farin av valskeiðnum, so tykist sum um, at oddafiskarnir í fullveldismálinum eru komnir eftir, at upprunaleisturin ikki vann undirtøku. Sum størsti andstøðuflokkur mugu vit fegnast um, at okkara boðskapur um skilagóðar broytingar av ríkisrættarliga málinum, eftir øllum at døma nú eisini fær undirtøku millum samgonguflokkar og samgongupolitikarar.

Landsstýrið hevur nú valt at saðla um, júst sum vit bóðu teir gera eftir fyrsta samráðingarumfar. Men tó er ætlan teirra enn so lítið ítøkilig, at neyvan teir sjálvir fult út eru greiðir yvir, hvør næsti leikur verður. Men lat okkum nú síggja.

Vit kunnu bara øll vera samd um, at framtíðarstøða Føroya má nú finna sína endaligu loysn. Vit mugu fáa hetta málið av dagsskrá fyri at geva pláss til onnur mál.

Í hesum stórpolitiska tjaki er menniskjað og felags ábyrgd fyri hvørjum øðrum dottin niðurímillum. Vit liva í eini tíð, har alt ov mong blint trúgva, at marknaðarkreftirnar einsamallar fara at loysa øll mál. Og í júst hesum liggur tað ein stór ábyrgd á allari fakrørsluni og okkum í Javnaðarflokkinum um at draga menniskjað inn aftur í fokus. Sjálvandi skulu vit brúka marknaðarkreftirnar, men tað skulu vera vit menniskju, sum hava tamarhald á hesum kreftum og ikki øvugt.

Fyri framman liggja stór mál og bíða okkum. Av hesum er pensiónsmálið uttan iva tað største. Tað er eingin loyna, at vit fegnir vildu verið partur av hesum arbeiði, sum skal finna eina endaliga loysn, men uppaftur meiri týdningarmikið er tað, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum fáa ein týðandi leiklut.

Góðu búskaparúrslitini seinastu árini hava tíverri ikki merkt batar fyri allar samfelagsbólkar og allar samfelagstænastur. Hetta tí at vit í liberalismurnar heilaga navni eru vorðin so profitorienterað, at vit heilt gloyma, at samfelagið er menniskjuni. Samfelagið er ikki skipanir og lyklatøl, men kjøt og blóð.

Tí er mítt ynski fyri 2001, at vit fáa menniskjað aftur í miðdepilin. At tey virði, sum skapa felagsskapin og styrkin í hesum vinna frama. At øll mál verða loyst, so tey muna so mongum sum gjørligt.

Og við hesum fáu orðum vil eg ynskja øllum føroyingum eitt gott nýggjár.



Miðflokkurin
*Jenis av Rana*

### Hvør ger av, hvussu 2001 fer at verða?

Seinnapartin hósdagin møtti eg einum av ungu monnum okkara, mitt á Áarvegnum í Havn. Glaður og smílandi heilsaði hann mær, prátið var vinsælt og positivt, og hann hevði á munni hvussu glaður og optimistiskur føroyingurin var- 2000 hevði vignast væl fyri flestu, og vónirnar fyri framman vóru bjartar.

Jú, signingar Harrans hava verið nógvar í farandi ári, og mong spáa tað sama fyri komandi.

Men hvør avgerð tað, og hava vit møguleika fyri ávirkan? Neyvan avgerða vit fiskiskap ella fiskaprísir, svarar tú óivað, neyvan heldur rentustøðið, og neyvan veður og vind ella framtíðarstøðu okkara annars- ella hvussu?

Í Himli situr Hann, sum ein dagin myndaði og skapti Himmal og jørð- úr ongum! Eins og tá ynskir Hann enn í dag at mynda og skapa. Vit lesa í lyftisbók Hansara, at eygu Hansara skoða yvir alla jørðina og Hann ynskir at hjálpa tí, sum heilhjartaður er við Honum.Tann tjóð, tann familja, tann persónur, sum setur álit sítt á Hann, kann fult út rokna við dagligu hjálp hansara í øllum viðurskiftum- eisini í Føroyum.

Kann verða at vit í 2001 koma at uppliva broytingar í ríkisrættarligu støðu Føroya, kann verða, at viðurskifti okkara við E.S. broytast, kann verða at onnur týdningarmikil viðurskifti fyri samfelag okkara eisini broytast, alt tað er fjalt fyri okkum í skrivandi løtu, men lyftið um hjálp og trygd Guds broytist ikki! Hetta er grundarstøðið vit valdu at byggja politikk Miðfloksins á, og so verður framyvir ivast onga løtu í tí!

Á varðhaldi tá á stendur, verður eisini framyvir eitt av lyftum floksins! Tú, sum náttúrliga óttast broytingar í ríkisrættarligu støðu okkara, tú, sum av ringum royndum óttast raðfestingar ( ella kanska manglandi raðfestingar) politikkaranna, tú skalt vita, at vit verða har, ið á stendur! Rødd okkara verður at hoyrast, og vit fara at forða fyri at rættur teirra veiku verður brotin! Vit fara, vónandi saman við tær, at søkja Hann, sum veit hvat tænir okkum best. Hann ynskir okkum øllum eitt gott 2001, og Hann avgerð einsamallur, hvussu tað árið fer at vignast. Men avgerðandi fyri úrslitið verður tað álit, tú og eg vísa Honum.

Tjóðveldisflokkurin
*Høgni Hoydal*

### Ábyrgdarinnar ár hjá føroysku tjóðini



Jólini og nýggjárið er okkara háttur at prísa lívsvirðini og lívsins ringrás. At seta tey veruligu virðini, okkara kæru og næstakærleikan í hásæti.

Vit lata nakrar av skuffunum upp í teirri óendaligu kommoduni, sum menniskjasinnið er. Hjá nógvum eru skuffur, fyltar við tungari sorg. Tær kunnu kanska bert gloppast og ikki dragast út fyrr enn í komandi árum. Men hjá flestum eru vónandi eisini skuffur á tremur við góðum minnum og hendingum, sum standa útdrignar. Til reiðar at goyma tað nógva, sum nýggja árið hevur at bjóða. Væl útborin til at møta bæði gleði og sorg - og tí vanliga gerandisdegnum.

Føroyska tjóðin hevur havt nógv at gleðast um í brátt farna ári. Nógvir av okkara landsmonnum, sum noydd ust at fara av landinum, flyta nú heimaftur í stórum tali. Eftir tey døpru kreppuárini, valdar á flestu økjum dirvi, vón og áræði.

Tað er eins og tað várar nógvastaðni í Føroyum. Á bygd og í bý gongur sjón fyri søgn, at har fólk í felag seta sær nakað fyri - har grør. Neyvan nakrantíð áður hevur verið so stór framgongd innan mentan, vinnulív, búskap og á sosiala økinum, sum seinastu tvey árini.

Tó er ongin orsøk at halda, at nú gongur bert framá í Føroyum. Tað verður hvørki í komandi ári ella tey næstu, at Føroyar veruliga kunnu sigast at vera komnar úr kreppu. Tað fer at taka mong ár, at byggja upp aftur tað, sum er mist av ábyrgdarloysi og at rætta nøkunlunda uppá órættvísið, sum er framt.

At vit longu aftur eru farin á glið móti ábyrgdarloysinum merkja øll, sum tíma at lurta eftir føroyskum politikki í løtuni.

Komandi árið verður eitt ár, har tjóð okkara skal taka stórar avgerðir, sum krevja samanhald, áræði og treysti.

Í ár 2000 fingu vit staðfest, at føroyingar verða ikki viðurkendir sum tjóð. Tað vil siga, sum eitt fólk, ið hevur rætt til sjálvt at taka avgerð um sína stjórnarskipan og sum hevur ognarrættin til sítt náttúruríkidømi.

Í ár 2001 skal føroyska tjóðin sjálv á fólkaatkvøðu staðfesta sín rætt og sína skyldu til at taka fulla ábyrgd av øllum viðurskiftum.

At vit taka við teirri fullu ábyrgdini av okkara landi, er fortreytin fyri at megna tær mongu stóru avbjóðingarnar, sum liggja beint fyri.

Í ár 2001 verða fyrstu royndarboringarnar eftir olju undir Føroyum. Staðfesta vit ikki okkara tjóðarrættindi, hava vit heldur ikki staðfest okkara ognarrætt til undirgrundina og hava sostatt ikki fult ræði á gongdini, sum kann vera sera vandafull fyri alt samfelagið.

Í ár 2001 fara ábyrgdarloysið og útgjaringin frá 80'unum at spøkja í Føroyum í enn størri mun, enn vit hava sæð í ár 2000. Vit fara hvønn dag at síggja og hoyra fólk, sum lova gull og grønar skógir, um vit bert lata standa til.

Mín vón er, at vit øll kunnu standa saman um at gera ár 2001 til ábyrgdarinnar ár hjá føroysku tjóðini – uttan mun til partapolitiskar ósemjur.

Eg ynski øllum føroyingum eitt gott og eydnuberandi nýggjár.



Sambandsflokkurin
*Edmund Joensen*

### Heimsrákið er samband – sama hvat Vølvan spáar

Nýmótans tíðin eitur samband, tí eingin hevur nokk við seg sjálvan. Liberalur sosialur Sambandspolitikkur er "inn" í framkomna heiminum.

Fólk í nútíðarsamfelagnum vilja sjálvi sleppa at velja. Hvør einstakur vil hava valfrælsi og sosiala trygd.

Svarið uppá tað er liberalur, sosialur sambandspolitikkur. Hann er eisini "inn" í okkara framkomna parti av heiminum.

Dagliga rákið er, at fólkið í okkara parti av framkomna heiminum kastar saman á nøkrum økjum í ríkisfelagsskapi, fyri á tann hátt at fremja felags besta. Vit eru vitni til, hvussu menningin í evropeiska ríkisfelagsskapinum gongur við rúkandi ferð, og at langar bíðirøðir eru fyri at sleppa við.

Í Føroyum hendir tað øvugta. Føroya landsstýri ger alt, sum gerast kann, fyri at loysa, og kvetta bondini í okkara egna ríkisfelagsskapi.

Høvuðsorsøkin er helst, at flokkar hava ikki broytt politikk í heila øld og vilja tí gera júst, sum tá Ísland fyrst í farnu øld avgjørdi at loysa frá Danmark. Teir loysingarhugaðu hugsa ikki um, at onnur tíð er galdandi. Politiska skipanin, mentanin og fólkahugsanin vóru ørvísi tá og hvør tíðin skilir ikki aðra. Føroyar eru júst í eini liklastøðu saman við Danmark í ríkisfelagsskapinum. Ein liklastøða sum er gullverd fyri føroya fámentu tjóð.

Liberalur, sosialur sambandspolitikkur gevur bæði ríkisborgararættindi og atgongd og frælsi til at velja. Frælsi í ríkinum, og frælsi í ES og í heimshøpi.

Føroyar eiga sítt náttúrliga pláss í okkara framkomna parti av heiminum gjøgnum ríkisfelagsskapin. Tað er upp til okkum sjálvi at gera av, um vit nýta hetta plássið.

Sum partur av danska ríkinum hava Føroyar sjálvandi rætt til fullan ES limaskap við undantøkum, á sama hátt sum Álandsoyggjarnar hava fullan limaskap við undantøkum sum atland hjá Finnlandi.

Ein slík skipan gevur Føroyum allar fyrimunir og allar møguleikar fyri at fáa lut í, og at verða við í menningini av Evropa.

Við verandi skipan hava føroyingar flestu vansarnar, tó uttan fyrimunirnar. Hetta er ikki ein haldbar støða.

Fremstu serfrøðingar eru samdir um at fylgjan av loysingini hjá sitandi landsstýri gerst ein stór niðurgongd í livifóti, stór fólkafráflyting, ríkisborgarrættindi hvørva umframt aðrar skerjingar í rættindum føroyinga. Hesum vilja vit í Sambandsflokkinum forða fyri. Sambandsflokkurin hevur fulla svarið uppá ein modernaðan politikk. Ein politikk, sum gevur føroyingum allar framtíðar møguleikar, og fullan lut í heimsmenningini.

Sambandsflokkurin og ríkisfelagsskapurin eru alternativið. Tey eru lykilin og borganin fyri eini tryggari framtíð í Føroyum.

Við ynski um eitt av Harranum signað nýggjár!